Anthony Layden í bretska uttanríkisráðnum í Whitehall:

Marknatræta verður loyst seinni í ár

– Henda framstig á fundinum í London í mai er góður møguleiki fyri eini loysn av marknatrætuni eftir nøkrum mánaðum sigur Anthony Layden, sum hevur ábyrgdina av vestureuropeiskum málum í bretska uttanríkisráðnum. Hann sigur, at hugskot, sum Árni Olafson er komin við, verða frá bretskari síðu mett sum áhugaverd.

Jan Müller

Um miðjan mai verða samráðingarnar við bretar um undirgrundarmarkið tiknar uppaftur.

Ein av teimum, sum hevur verið við í samráðingunum í bretsku nevndini frá byrjan, til hann herfyri gjørdist leiðari í bretska uttanríkisráðnum fyri Vesturevropa (Head of Western European Affairs) er Anthony Layden. Sum ein av oddamonnunum á bretsku sendistovuni í Danmark hevur hann verið partur av samráðingarnevndini.

Hóast hann ikki longur er við í samráðingarnevndini, so fylgir hann samráðingunum frá sessi sínum í uttanríkisráðnum í London.

Semja í ár

Sosialurin hevur hitt hann og spurt, um vit nú kunnu rokna við, at gongd kemur á av álvara?

-Eg vóni tað. Tað hava verið fundir millum báðar samráðingarleiðararnar, har Árni Olafson er komin við nøkrum nýggjum hugskotum. Vit hava sagt frá, at hesi hugskot hava okkara áhuga, og eg skilji, at tað hevur verið arbeitt meira við teimum á føroyskari síðu. Nú fáa vit so at síggja, hvat kemur burtur úr í London í mai.

Anthony Layden sigur, at hann hevur tosað við David Anderson, leiðaran í bretsku samráðingarnevndini um hesi nýggju hugskotini.

-Vit halda, at tey eru positiv og heilt givið ein skila góð leið at fylgja.

-Men merkja hesi uppskotini eina broyting í føroysku støðuni?

-Eg haldi ikki nakar av partunum nú hevur broytt støðu sína munandi. Báðir partar eru greiðir yvir fyrimunirnar við at fáa eina avtalu við samráðingum og tí kanna vit allar møguleikar fyri at vita, um ein loysn kann finnast.

Bretar slakað nógv

-Men er tað ikki so, at annar av partunum verður noyddur til at slaka meira enn hin, um ein avtala skal gerast?

-Skulu vit koma nærri eini loysn, so mugu báðar partar slaka nakað frá tí støðu teir hava í løtuni.

Anthony Layden sigur, at bretska samráðingarnevndin longu hevur slakað nógv í mun til upprunakravið.

Heldur hann at føroyingar eru ov tungir at samráðast við?

-Nei, eg haldi, at báðir partar royna at verja áhugamálini hjá sínum egnu.

-Nú hevur marknamálið áhuga fyri flest allar føroyingar, sum fylgja nevst við málinum. Talan er um eitt mál, sum kann fáa stóran týdning fyri lagnuna hjá hesum fólki. Í Bretlandi er hetta hinvegin eitt sera lítið mál, sum eingin gevur sær far um. Skilir tú ikki støðuna hjá føroyskum myndugleikum, at teir ikki kunnu slaka uttan at tað skal vekja fólksins vreiði?

-Eg dugi væl at skilja tykkara støðu. Tað er rætt at almenni áhugin í hesum máli er ikki tann sami í Bretlandi sum í Føroyum og tí skilji eg væl, hvussu torført støðan er hjá tykkum. Men hinvegin eigur ein ikki at undirmeta týdningin av málinum í Bretlandi. Vit kunnu ikki liva við, at fólkið í Bretlandi skal fáa ta fatan, at vit geva burtur øki sum vit sambært altjóða lóg halda hoyra til Bretland.

Anthony Layden heldur sjálvur, at tað framvegis er ein góður møguleiki at finna eina samráðingarloysn longu í ár.

Henda framstig á fundinum í London, so er góður møguleiki fyri eini loysn um nakrar mánaðir tvs. í heyst ella í vetur.

Føroyingar vita eins nógv

Vit spurdu Anthony Layden um ikki tað nógva seismiska virksemið og harvið itøkiliga vitanin um, hvar olja er at finna í Hetlandsrennuni og kanska vestan fyri miðlinjuna, hevur givið Bretlandi fyrimunir í samráðingunum?

-Eg haldi ikki, at tað er nakað munur á tí vitan, sum báðir partar hava um undirgrundina her.

-Men alt bendir á, at tað mest áhugaverda økið fyri oljufeløgini er nettup partur av tí umráðinum sum tit krevja og ikki vilja sleppa tvs. økini vestan fyri Hetlandsrennuna áraknað oljukeldurnar Foinaven og Schiehallion?

-Tað er rætt, at stórur áhugi er fyri hesum økjunum. Og nettup tann sannroynd, at tað er so stórur áhugi fyri júst hesum umráðinum, sum trætan snýr seg um, ger samráðingarnar so torførar.

Duga bretar ikki at skilja føroyingar tá tað verður sagt hví skulu vit slaka og geva frá okkum kanska tað einasta økið har olja finst?

-Tað er ikki ein spurningur um at ein partur skal láta nakað frá sær, sum hann eigur. Tað er nettup tað sum báðir partar royna at finna fram til, nevniliga hvat altjóða lóg vil siga um hetta.

Upprunakravið í so bjartskygt

Anthony Layden viðgongur, at upprunaliga bretska kravið var "very much on the optimistic side" tvs. at tað var í so viðgongt, men hann heldur fyri, at partarnir í dag eru nógv nærri eini semju, enn tá samráðingarnar byrjaðu.

"But the last little bit, the last difference between the to present lines, is the most difficult bit to solved" sigur Anthony Layden tvs., at tað seinasta litla pettið, seinasti munurin millum tær báðar verandi linjurnar, er eisini tann ringasti at loysa.

-Men hvat sigur tú til orðini hjá løgmanni og formanninum í uttanríkisnevndini um, at teir vilja hava eina miðlinju?

-Hevði altjóða dómstólurin hugt at spurninginum hevði hann ikki ásett eina beinleiðis miðlinju. Tað gjørdi hann ikki millum Grønland og Jan Mayen og heldur ikki millum Malta og Libya. Linjan varð flutt tí hitt landið hevði longri

Framhald á síðu 28



Umboðsstovan í Brússel neyðug

Heldur Trúgvi Johansen, umboðsmaður Føroya í Keypmannahavn

Eirikur Lindenskov

Vit hava eisini biðið Trúgva Johansen, sum er leiðari fyri Viðskiftastovuna í Keypmannahavn um viðmerkingar, nú løgtingið fer undir viðgerð av uttanlandsmálum í dag.

Viðskiftastovan í Keypmannahavn var stovnað í 1973, men ikki rættuliga formaliserað fyrr enn í 1979. Trúgvi Johansen hevur verið leiðari øll árini, og hevur á tann hátt virkað sum eitt slag av sendiharra í Danmark. Hann heldur eisini, at tað størsta málið hjá føroyskum politikarum at viðgera er viðurskifti okkara við ES.

- Eg haldi, at vit fyri longu tíð síðani áttu at havt fingið eina umboðsstovu í Brússel. Um so var, høvdu vit óivað verið betur kunnað um viðurskiftini og høvdu kunna fyrireikað okkum til viðurskiftini í ES, og sostætt kanska fingið eina betri avtalu, heldur Trúgvi Johansen.

- Tað er greitt, at um vit høvdu fólk í Brússel, so høvdu vit betur kunna ávirkað og fylgt við. Nú skal eg ikki leggja meg út í, hvussu støða Føroya til ES-limaskap skal verða, men vit koma so altíð at hava avíst tilknýti til ES og tað eiga vit ikki at ræðast, men viðgera positivt.

Trúgvi Johansen vísir eisini á, at Føroyar hava brúkt lítlar kreftir til uttanlandspolitikk, og als ikki verið við til altjóða samráðingar á ymsum økjum, eitt nú GATT.

- Sammeta vit okkara uttanlandspolitikk við tann grønlendska, so hava teir gjørt nógv meira og hava luttikið nógv meira í altjóða politiskum arbeiði enn vit, heldur Trúgvi Johansen, sum heldur at grønlendingar nýta fimm til tiggju ferðir so nógva orku upp á uttanlandspolitikk, sum føroyingar.

Trúgvi Johansen hevur verið umboðsmaður í Danmark síðani 1973

Trúgvi Johansen heldur, at føroyingar tó eru komnir væl áleiðis á summum økjum og nevnir eitt nú fiskiveiðisamráðingar og marknatrætuna við Stórabretland.

– Tær samráðingarnar haldi eg liggja í góðum hondum, hóast aðfinningar. Eg haldi eisini, at støðið á okkara uttanlandspolitikki er hækkað nógv seinnu árini. Vit hava verið ov passiv og eru ikki komin nóg langt, serliga um vit hugsa um altjóða avtalur um toll, umhvørvi o.s.fr.

– Nú síggi eg, at uttanlandsarbeiðið verður uppprioterað, og tað haldi eg vera sera gott, sigur Trúgvi Johansen at enda.

A

Einasta blaðið **5** ferðir um vikuna

tíðindablaðið
sosialurin

Telefon 11820 Telefax 14720

Sosialin finnur tú á Internet:
http://WWW.cybernet.dk/faroe-news
e-mail: sosialur@olivant.fo

veðrið

Lágtrýstið skamt eystan fyri Føroyar, ið seinastu dagarnar hevur elvt til eystanvind við regni, tekur seg burtur eystureftir, men longu í dag nærkast nýtt lágtrýst við regni Føroyum vestaneftir. Hátrýst breiðir seg í vikuskiftinum úttari av Atlantshavi móti Íslandi og kalda luftrák hægt verður aftur eitt skifti móti Føroyum. Nýtt regnøki nærkast aftur Føroyum mánadagin og týsdagin.

Fríggjadagin & leygardagin

Einamest millum gul og stívt andøvsgul. 5–10 m/s. millum landnyrðing og landsynning. Adrigið, væl av regni í skiftum, annars tøluligt, hóast kanska skiftandi sýni. Út á seinnapartin leygardagin nærum turt og gott sýni. Hitin millum 3 og 8 stig.

Sunnudagin

Friskandi til millum andøvsgul og struk í vindi, 8–13 m/s, av landnyrðingi, lutvíst adrigið, hendinga æl, stundum vatnalættings- ella kavaælingur, annars gott sýni og eisini sólarglottar. Hitin um dagin millum 3 og 6 stig, um náttina niður ímóti frostmarkinum.

Mánadagin & týsdagin

Makandi til millum gul og stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av ymsum ættum, adrigið, regn- ella vatnalættingsælingur upp í millum, annars tøluligt ella gott, hóast nakað skiftandi sýni. Hitin millum 2 og 5 stig.

Kórstevnan 1996

Fyrra konsertin í Missiónshúsinum í Leirvík í kvøld kl. 19.30
Seinna – hon við stóra felagskórinum – í Gøtu kirkju í morgin kl. 17.00

Í gjár byrjaði árliga kórstevnan, sum í ár verður hildin í Gøtu og í Leirvík.

Kórsangarar – væl út í hálvtriðja hundrað í tali úr at kalla øllum landinum – fyrstust um middagsleitið í Gøtu skúla og kl. 13.00 varð stevnan sett.

Kl. 16.00 luttóku hesi stóru sangaraflokkar í flaggdagshaldinum í Leirvík við føroyskum sangum, sum Bjarni Restorff, kórleiðari hjá felagskórinum Gøta/Leirvík, stjórnaði.

Í kvøld kl. 19.30 verður konsert í Missiónshúsinum í Leirvík, har ikki færri enn 13 kór verða at hoyra, men hvørt við stuttari skrá upp á ikki meira enn 6 minuttir. Tey fara at syngja í hesari raðfylgju:

1. Eystankórið, 2. Kristiliga Sangkórið, 3. Nólsoyar Sangkór, 4. Glymur, 5. Vágakórið, 6. Vestmanna Sangkór og 7. Fuglafjarðar Manskór.

Eftir steðgin verður raðfylgjan hendan:

8. Fuglafjarðar Gentukór, 9. Kollafjarðar Sangkór, 10. Havnarkórið, 11. Fuglafjarðar Sangkór, 12. Rytmiska kórið í Hoydølum og 13. Manskórið á Skálafjørðinum.

Sum fyrr fráboðað er tað **Imants Kokars**, kórgandakallurin úr Lettlandi, sum leiðir felagskórið í ár. Vant varð í gjár langt út á kvøldið, og í dag verður hildið fram fyrrapart og seinnapart. Eftir felagsvenjing aftur í morgin fyrrapart verður aðalroynd kl. 14.00, og *kl. 17.00 verður seinna konsertin í Gøtu kirkju*, har umframt stóra felagskórið 5 einstøk kór verða at hoyra.

Heilt 13 kór verða at hoyra í Missiónshúsinum í Leirvík í kvøld og onnur 6 kór, umframt stórt felagskór, syngja í Gøtu kirkju í morgin

Konsertskráin leygardagin verður hendan:

1. Stevnukórið
2. Tóftakórið
3. Røddir
4. Ljómur
5. Felagskórið Gøta/Leirvík
6. Stevnukórið

Kórstevnan endar sum vant við veitsluhaldi, sum verður í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Framhald av síðu 6

strandalongd. Og tað er tað sama, sum vit halda er galdandi her.

Men kann tað ikki vera, at ein dómstólur fer at døma út frá øðrum viðurskiftum so sum hvussu bundið eitt lítið samfelag er av tilfeinginum í tesss umhvørvi? Kann tað ikki hugsast, at dómstólurin fer at leggja dent á heilt onnur viðurskifti enn strandalongd í hesum serstaka førinum og tí ásetta eina miðlinju?

-Tað er fullkomiliga rætt. Og hetta er eisini júst tað, sum tykkara samráðingarfólk siga.

Anthony Layden sigur, at føroysku samráðingarfólkini eru so væl inni í altjóða lóg.

Ikki illvilji

Vit spurdu hendan framstandandi bretska embætismannin, um ikki upprunaliga og sera víðgongda bretska kravið um rættin til undirgrundina við Føroyar var ein sera óvinarlig gerð, sum avgjørt ikki sómir seg eini størri tjóð sum Bretlandi móti eini nógv minni grannatjóð sum Føroyar?

Soleiðis sigga vit ikki uppá tað. Tað er als einki óvanligt ella óloyligt í tí, at tú út frá taktiskum grundum biðjur um meira, enn tú roknar við at fáa, tá tað skal samráðast um eina loysn, sum báðir partar skulu góðtaka.

Men tað harmar meg, um føroyingar taka hetta sum eitt tekin um illvilja. Tí tað var avgjørt ikki ætlanin at vera óvinarligur. Talan er um eina vinarliga samráðing um markið millum tvær vinsælar grannatjóðir. Men eg dugi væl at siggja, at hetta hevur nógv størri týdning út frá einum føroyskum enn einum bretskum perspektivi. Men tað er einki óvanligt at hava samráðingar um slíkt, og tað er heldur ikki óvanligt sjálvt fyri teir bestu vinirnar, at teir ikki kunnu semjast og at tað tí er neyðugt at fara til altjóða dómstólin, soleiðis sum tað eisini hendi millum Danmark og Noreg um Jan Mayen.

Men hevði málið ikki kunnað verið loyst longu um tit ikki settu so víðgongd krøv upprunaliga, og hava tykkara krøv ikki sett ein kíla í møguleikan hjá føroyingum at fáa gongd á eina oljuvinnu?

-Hetta seinkar og forðar eisini okkara egna oljuídnaði at kunna fara víðari í marknaøkinum. Og hetta má ein skilja skaðar meira bretska búskapin enn tann føroyska, men eg viðgangi, at málið (proportionalt) fyri tykkum er av størri týdningi enn fyri okkum.

Anthony Layden vónar, at ein avtala verður gjørd soleiðis, at bæði londini kunnu arbeiða saman í oljuvinnuni.

Uppá fyrispurning um møguleikar fyri at gera eina samarbeiðsavtalu um tey mest umstríddu økini váttar Anthony Layden, at hetta er ein møguleiki.

Er tað ein partur av hugskotunum hjá Árna Olafsson, sum tú nevndir í byrjanini?

-Vit mugu bíða við at svara tí spurninginum til vit vita, hvat Árni Olafsson hevur at siga á komandi fundinum.

Anthony Layden sigur seg væl skilja føroyska óttan fyri ongva loysn at hava fingið, áðrenn føroyingar bjóða út fyrstu økini til oljuleiting.

-Vit vilja gera alt fyri at kunna finna eina loysn áðrenn ta tíð. Men tað skulu tveir partar til at fáa eina avtalu.

Vestfalskyrrindi

24. apríl: Mánin longst frá jørðini
25. apríl: Fyrra kvarter
3. mai: Fullmáni
6. mai: Mánin næstur jørðini

Dato	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	Haraldssundi/Leirvíksfirði fp.	sp.	Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.
26 apr	0147	1425	0347	1625	0002	1240	0202	1440	0047	1325	0102	1340
27 apr	0304	1523	0504	1723	0119	1338	0319	1538	0204	1423	0219	1438